**Mentamálastýrið**
**mentamáladeildin**

# Lærugreinaráðgevar

**Starvið**
Í Mentamálastýrinum/-Landsmiðstøðini eru nakrir tímar sum ráðgevar leysir at søkja til setanar frá 1. august 2001.

Ráðgevingin fatar um lærugreinirnar landalæru, søgu og miðlar. Dentur verður lagdur á, at arbeitt verður í tvørgreinaligum høpi, og møguleiki er at søkja eina ella fleiri lærugreinir.

Samanlagt eru 12 lønartímar um vikuna at søkja (ein lønartími svarar til umleið 11/2 fyrisitingartíma). Vanliga verður ráðgevi settur við 8 til 12 lønartímum um vikuna.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiligan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein/-um og starvsøkjum, starvið fatar um. Væntað verður, at lærugreinaráðgevin hevur førleika og er hugaður at nýta KT í ráðgevastarvinum.

**Setanar- og lønartreytir**
Lærugreinaráðgevin verður settur eftir avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag. Tann, ið settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skal verða Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi hósdagin 5. apríl 2001.

Gjøllari upplýsingar fáast frá leiðaranum á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

**Mentamálastýrið og Landsmiðstøðin**

**Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt hevur stýrið uppgávur, ið viðvíkja kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.
**Landsmiðstøðin** er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingaramboð, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við Mentamálastýrinum eina lærugreinaráðgevaskipan og skipar fyri fak- og inspiratiónsskeiðum fyri lærarum.

---

Toftild Alternativt Hår

# NÝTT HÁR!





**HOTEL HAFNIA (Loftið)**
Leygard. 24. mars og
sunnud. 25. mars
frá kl.14.00 - 19.00

**SJÓMANSHEIMIÐ Í KLAKSVÍK**
Mánad. 26. mars
kl.12.00 - 18.00

Vinarliga ring og bílegg tíð

*Nú koma vit aftur á vitjan í Føroyum.*
*Við okkum hava vit snotuligasta úrvalið av hárkollum og parúkkum.*
*Vit hava einaumboðan av nýggjari japanskari tægr, sum er einastandandi slitsterk, og tískil serstakliga vælegnað til fólk við kropsliga hørðum arbeiði - til dømis fiskimenn, handverkarar og onnur.*
*Hárluturin hevur ótrúlig evni at halda hársniði, og verður ikki sleipin sum frálíður. Harumframt er hann sera vælegnaður til varandi áseting.*
*Og júst varandi áseting er serøki okkara. Lagdur verður ein tráður undir húðina, og síðan verður hárluturin fastgjørdur. Nú vaskar og greiður tú hárið, sum var tað títt egna. Ein léttur og fittligur máti at endurnýggjað hárið. Sjálvur avger tú alt um lit, snið, bygnað o.s.fr.*
*Legg til merkis:*
*Vit eru fremstu útvegarar og serfrøðingar Danmarkar tá umræður øðrvísi hár, so kom innar og hygg at tilfarinum...*



HENNING TOFTILD
Toftild Alternativt Hår

BUDOLFI PLADS 9 DK-9000 AALBORG
TLF: 98 10 32 11 FAX: 98 13 36 22
www.alternativt-haar.dk

---

# MANNING

Hervið verður søkt eftir
**maskinassistentum**
til M/F Norrönu, at byrja beinanvegin.



**Fylgjandi krevst:**

- **Heilsuprógv** fyri sjófólk, ikki eldri enn 2 ár.
- **Trygdarskeið,** prógv í nýtslu av bjargingarútgerð.
- **Brandskeið,** roykkavari ikki eldri enn 5 ár.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**P/F SMYRIL LINE**
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

---

**Fyri lærara í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir**

# Lærara

**til Eiðis skúla at byrja 2. apríl og skúlaárið út.**

Starvið, sum er tíðaravmarkað, er 19 undirvísingartímar um vikuna.

Umsøkjarin skal kunna undirvísa í:
Føroyskum í 4. flokki
Donskum í 7. flokki
Handarbeiði

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meira kann fáast at vita um starvið við at venda sær til fyrstalæraran á tel. 42 35 79 ella 44 33 31.

Eiðis skúli hevur undirvísing 1.–7. árgangi. Tað arbeiða 9 lærarar og 96 næmingar í Eiðis skúla.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera Eiðis skúlanevnd í hendi seinasta lagi fríggjadagin 23. mars 2001.

**Eiðis skúlanevnd**
v/ Dortheu K. Sørensen
470 Eiði

---

# Skrivstovufólk

**Landsbankin søkir eftir skrivstovufólki**

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um post, journal og skjalagoymslu, telefonavgreiðslu, skrivarauppgávur og annað skrivstovuarbeiði.

Arbeiðið er skiftandi, av tí at stovnurin er lítil og uppgávurnar eru fjølbroyttar.

**Førleiki**
Tað gevur fyrimun at hava
- Skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving
- Edv á brúkarastigi
- Royndir í journal- ella øðrum skrivstovuarbeiði
- Roknskaparkunnleika

Møguleikar eru fyri eftirútbúgving og luttøku í skeiðum

**Løn**
Eftir avtalu við støði í sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag

**Tíðarfreistir o.a.**
Vit hava brúk fyri fólki so skjótt sum til ber.

Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Sigurd Poulsen, stjóra sigurd@landsbank.fo ella Jens Erik Magnussen, undirstjóra jem@landsbank.fo um fleiri upplýsingar á tlf. 318305.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu saman við neyðugum upplýsingum um útbúgving og størv sendast landsbankanum í seinasta lagi 30. mars 2001:

**Landsbanki Føroya**
Müllers Hús - Gongin
Postrúm 229 - FO-110 Tórshavn
E-postadr.: landsbank@landsbank.fo

Landsbanki Føroya er bankasamband landskassans. Hann umsitur gjaldføri og stendur fyri lántøku landsstýrisins og samstarvar við aðrar myndugleikar og almennar stovnar.

Landsbankin virkar fyri tryggum fíggjarviðurskiftum í landinum. Bankin skal tí halda seg kunnaðan um fíggjarmarknaðarviðurskifti og samstarva við fíggjarstovnar og landsstýrið um hesi viðurskifti. Lýsingar av búskapinum eru týðandi liður í hesum uppgávum. Sí eisini heimasíðuna http://landsbank.fo

---


# CAFÉ NATÚR

Vit selja allir
rættir út av húsinum t.d.

- Cafédrykkir og súpan í termokrússum
- Bakað epli o.a. heitir rættir
- Sandwich o.m.a.

Enskur vísusangur
og undirhald

*Doc undirheldur til 18. mars*

Broyttur matarseðil

Nógv nýtt leskiligt er komið á matarseðilin, t.d. av víni og cafédrykkum. Nógv nýggj sløg av sandwich.

*livandi tónleikur*

CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25


**veitst tú ikki tað?**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3117, **Sp/f Sproti, 625 Glyvrar.**

**Viðtøkur broyttar:** 13.03.2001.
**Nýtt navn:** Sp/f Fregnir
**Strikað hjánavn:** Sp/f Okkaraland
**Nýggj adressa:** N. Finnsensgøta 16, 100 Tórshavn.
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Kapitalur:** Hækking við kr. 80.000,00 til kr. 160.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.

Skráseting Føroya tann 15. marts 2001

Kristin Balle

---

## Kunngerð um broyting av ALS-gjaldinum

Við heimild í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, § 9, stk. 3, hevur stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina fyrisett:

**§ 1.** Tað í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, § 9, stk. 1, nevnda ALS-gjald er 1,25 %.

**§ 2.** Henda kunngerð fer í gildi frá 1. apríl 2001. Samstundis fer úr gildi kunngerð um broyting av ALS-gjaldinum, dagfest 26. november 1999.

Stýrið fyri Arbeiðsloysisskipanina, 7. desember 2000

Karin Kjølbro (sign.) formaður

/ Elisabeth O. Gaardbo (sign.)

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 22 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.*

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
teldupostur: als@als.fo


Restorffs SISU


---


ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893

ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA


---

Søkt verður eftir

# Dagrøktarleiðara

til dagrøktarskipanina í Sjóvar Kommunu.

Til starvið krevst námsfrøðilig útbúgving.

Umsóknir til starvið skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 3. apríl 2001.

**Sjóvar Kommuna**
490 Strendur

---

# Ársaðalfundur

Ársaðalfundur Føroya Sparikassa verður
**fríggjadagin 30. mars 2001, kl. 17.00**
á Hotel Hafnia, Tórshavn.

Skrá sambært grein 6 í viðtøkum Sparikassans:

a. Val av fundarstjóra
b. Frágreiðing frá nevndini um virki Sparikassans í farna ári
c. Grannskoðaður roknskapur verður framlagdur til góðkenningar
d. Val av limum í nevndina
e. Val av grannskoðarum
f. Uppskot frá stjórn, nevnd ella umboðsráðslimum
g. Ymiskt

**Nevndin**

FØROYA SPARIKASSI

---


FA. EB. GREVSTUR

Alt fyrifallandi arbeiði verður gjørt.
so sum:

◊ Havar og stoyping av garðum
◊ Kloakarbeiði

Við Beltmaskinu og lastbili.
Tilboð vera givin.

FA. EB. GREVSTUR
Tlf. 31 63 73 - 22 46 30
J. Bronchsgøta 32, FO-100 Tórshavn



Sosialurin -har tað hendir



VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SAGING
Rennir, keiðki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

GÓLV SLÍPING

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898